# Nú er munurin bara fýra stig



*Jesper Bech var upphavsmaður til forloysandi 1-0 málið, tá FCK um vikuskiftið legði enn meira trýst á Brøndby*

**Brøndby megnaði bara málleysan javnleik á heimavølli, og tá ið FCK fekk fult í Parkini, tódnaði fjarstøðan til Brøndby, sum framvegis er oddalið, niður til fýra stig**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað gerst alt tættari í kappingini um danska meistaraheitið. Í vetrarsteðginum var Brøndby sekstan stig frammanfyri FCK. Eftir at várhálvan er seks umfør gomul, er munurin millum tey bæði stórfeløgini minkaður til fýra stig.

Brøndby og FCK skulu spæla eina ferð afturat í hesum kappingarárinum. Tað vil við øðrum orðum siga, at um Brøndby kiksar eina ferð afturat, og FCK fer at halda fram við at vinna, soleiðis sum teir hava gjørt higartil í vár, so bendir alt á, at tað, sum í vetrarsteðginum var óhugsandi, fer at gerast til veruleika, og at tað harvið verður FCK og ikki Brøndby, sum verður meistari.

Leygardagin hevði FCK í Parkini vitjan av illa stadda FCN. At Todi Jónsson og fleiri liðfelagar eru skaddir, og at tveir FCK spælarar vóru leikbannaðir, bar við sær, at teir í FCK vóru noyddir at tøma hópin, sum venjarin, Hans Backe, tók til. Tað vildi m. a. siga, at tveir ungir spælarar, sum hava vant saman við teimum bestu síðani í summar, vóru á beinkinum, og teir vórðu báðir settir á vøllin.

Tað tók sína tíð, men enn eina ferð eydnaðist tað FCK at vinna. Tá ið eitt korter var eftir stútaði Peter Møller, sum stutt framman undan var komin á vøllin, vakurt til 1-0, eftir at Jesper Bech hevði lagt innfyri, og nakrar minuttir seinni setti Álvaro Santos, sum enn eina ferð royndist sera væl, krúllin undir frísparksinnlegg frá Magna Hoseth.

Harvið hevði FCK lagt eyka trýst á Brøndby, sum sunnudagin átti heimavøll móti Silkeborg. Brøndby hevði stóra yvirvág, og teir spældu væl, og teir vóru ofta frammanfyri Silkeborg málinum, men tað eydnaðist ikki at fáa bóltin inn um Silkeborg málverjan, Henrik Ipsen, sum var ein sannur brandur.

FCM er framvegis á triðja plássinum, men eftir at teir høvdu spælt tjúgu ferðir á nýggja stadion, uttan at mótstøðuliðið hevði vunnið, taptu teir. AGF, sum bara hevði vunnið eina ferð í vár, var fyrsta felagið, sum fór við øllum av SAS arenuni. Teir vunnu 1-0.

OB hevur leingi verið í tungum sjógvi, og viðhaldsfólkini hava síðstu tíðina aftur og aftur givið til kennar, at tey vilja hava, at felagið gevur venjarunum báðum sekkin. Tað vil stjórin í felagnum ikki hoyra talan um, og kanska fingu venjararnir eitt sindur av kredit, eftir at undirhaldandi uppgerð á heimavølli móti Viborg endaði málleys.

Esbjerg plagar at vinna stórt á heimavølli móti Herfølge, og tað gjørdu teir aftur hesa ferð. Úrslitið var 5-1. Tá ið Herfølge minkaði um munin til 5-1, hevði Herfølge spælt 728 minuttir uttan at gera mál á útivølli.

Støðan í botninum broyttist einki, tá ið tað ræður um stig. Randers, sum hevur havt ávísan undanvind seinastu ferðirnar, hevði vitjan av AaB, og teir í Aalborg vóru sannførandi í grannauppgerðini. Teir vunnu 4-0.

## Claus framvegis hóttur

**Hesa ferð misti Coventry tvey stig á útivølli í síðstu sekundunum, eftir at teir høvdu verið framman fyri allan 2. hálvleik**

ENGLAND
1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað er framvegis ógreitt, hvar landsliðsspælarin, Claus Bech Jørgensen, fer at spæla eftir summarsteðgin, og tað er framvegis ógreitt, um felagið, sum hann hevur sáttmála við fram til kappingarenda, framvegis fer at spæla í næstbestu deildini, ella um teir fara at flyta eina deild niður.

Leygardagin vóru teir á odda alt seinna umfarið. Teir vóru í Plymouth, har teir løgdu seg framum í síðstu sekundunum av fyrra umfarinum. Ta leiðsluna hildu teir, inntil nøkur heilt fá sekund vóru eftir av tíðini, sum dómarin heví lagt afturat seinna hálvleiki. Tá javnaði heimaliðið.

Claus Bech Jørgensen var eykamaður hesa ferð, og hann varð settur á vøllin í 66. minutti.

Coventry venjarin, Micky Adams, segði seg vera sannførdan um, at útjavnandi málið átti at havt verið kolldømt:

- Dómarin bríkslaði ikki av, tá ið tíðin, sum hann hevði givið til kennar skuldi leggjast afturat, var farin, og harafturat var tað fríspark, áðrenn bólturin fór í málið, segði Coventry venjarin.

# Nógv gummibein í toppinum

**Einki av teimum trimum oddaliðnum í næstbestu deildini megnaðu at fáa fulla úrtøku, og enn eina ferð var spælitíðin hjá Andrew av Fløtum avmarkað**

DANMARK
1./2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Toppliðini tykjast hava fingið gummibein, nú tað gerst støðugt størri álvari um, hvør skal enda á teimum báðum ovastu plássunum og harvið flyta upp í superliguna.

Mest óvæntaða úrslitið hesa ferð var í Horsens, har Johan Byrial Hansen og liðfelagarnir ikki megnaðu meiri enn 1-1 móti B93, sum er botnlið og stríðist meiri ella minni vónleyst stríð fyri at sleppa undan niðurflyting.

B93 legði seg á odda, tá ið eitt korter var farið, og teir megnaðu at halda tætt, inntil átjan minuttir vóru eftir.

Jón Rói Jacobsen var í miðverjuni, og Gunnar Nielsen sat enn eina ferð so trúfastur á beinkinum, tá ið Frem var í Vejle. Har endaði tað málleyst.

Hóast teir ikki fingu fulla úrtøku í Vejle, so styrktu teir í Frem um sína støðu í kappingini um at flyta upp. Tað gjørdu teir, tí SønderjyskE, sum er næstfremst, tapti í Nykøbing Falster, har heimaliðið vann 2-1. Tað var eisini rættuliga óvæntað úrslit.

Nú eru SønderjyskE og Frem borð um borð við 43 stigum, meðan vandin tykist lítil ella eingin fyri, at Horsens skal kiksa, tí teir hava 51 stig.

Andrew av Fløtum var enn eina ferð á beinkinum hjá Fremad Amager. Hann var á vøllinum síðsta hálva tíman, men hann var ikki millum málskjúttarnar. HIK vitjaði í Sundby, og gestirnir vóru frammanfyri bæði 1-0 og 2-1. Úrslitið gjørdist 2-2.

### John málskjútti

Orsøkin til at John Petersen næstsíðsta vikuskifti ikki var á liðnum hjá Holsterbro var tann, at hann var í Føroyum í brúdleyp hjá systrini. Nú var hann aftur í Holstebro, sum tapti 3-1 á heimavølli móti Glostrup. John legði Holsterbro framum, men undan steðginum var aftur javnt, og seinna helmingin av 2. hálvleiki skoraði Glostrup tvær ferðir. Holsterbro er næstniðast.

Lyngby vann 3-2 á heimavølli móti Næsby, men Christian Lamhauge Holst var ikki á liðnum hesa ferð.